# Sambandið aftur stóra afturgongd

**Sambandsflokkurin fekk ein dyggan frammaná, tá flokkurin fyri aðru ferð á rað misti mest í mun til hinar flokkarnar**

VAL 08
*Stefan í Skorini*
*stefan@sosialurin.fo*

Annað valið uppí slag hevði Sambandsflokkurin eina afturgongd á meira enn tvey prosent. Flokkurin hevur tilsamans mist fimm prosentstig seinastu tvey valini.

Á valinum í 2002 gjørdist Sambandsflokkurin tann stóri sigursharrin, tá flokkurin fekk 26 prosent av atkvøðunum. Hetta var ein framgongd á heili átta prosent.

Á valinum í 2004 vístu veljarakanningar, at flokkurin fór at fáa framgongd, men flokkurin stóð seg illa í valstríðnum og fekk tá avtornaði bert 23,7 prosent av atkvøðunum. Afturgongdin var 2,3 prosent. Sambandsflokkurin hevði ta størstu afturgongdina í prosentum, men var tó framvegis størsti flokkur í atkvøðum, hóast Tjóðveldi fekk fleiri tinglimir.

Valið 2008 gjørdist heldur soltið hjá Sambandsflokkinum, og hann gjørdist aftur tann flokkurin, sum misti mest í prosentum. Sambandsflokkurin hevði eina afturgongd á 2,7 prosent og fekk 21 prosent av atkvøðunum tá samanumkom. Flokkurin varðveitir tó sínar sjey tinglimir.

Sambandsflokkurin hevur tí tvey val á rað havt ta størstu afturgongdina mátað í prosentum og er farin úr 26 prosentum í 2002 niður í 21 prosent í 2008.

Stór afturgongd á tveimum valum á rað setir stór spurnartekin við, hvussu Sambandsflokkurin hevur megnað at ført valstríð seinastu tvær ferðirnar. Leiðslan má seta sær spurningin, hvat hon ger skeivt, tá hon megnar at vera tann flokkurin, sum missir mest í prosentum tvey val á rað.



# Lítil broyting í floksbýtinum

**Javnaðarflokkurin misti ein tinglim, meðan Sjálvstýrisflokkurin og Miðflokkurin fingu ein afturat í sín lut. Føroysku valini hava seinastu árini ikki verið eyðkend av teimum stóru veljaraflytingunum**

VAL 08
*Stefan í Skorini*
*stefan@sosialurin.fo*

Føroyski veljaraskarin hevur seinastu árini ikki sæð orsøk til at kollvelta býtið at tinglimum millum flokkarnar á sama hátt, sum vit sóu á teimum báðum valunum í 1994 og 1998.

Valið í 1994 gjørdist ein katastrofa fyri Javnaðarflokkin, sum misti helvtina av sínum tinglimum, meðan Sambandsflokkurin fekk eitt kanónval. 1998 var árið hjá Tjóðveldisflokkinum, sum tvífaldaði sítt tal av tinglimum úr fýra upp í átta, meðan Sambandsflokkurin gekk nógv aftur.

Seinastu trý løgtingsvalini hava hinvegin ikki verið merkt av serliga stórum rembingum í veljarafjøldini, og tí hevur býtið millum flokkarnar verið hampuliga stabilt.

Hesuferð varð tingmannatalið hækkað úr 32 upp í 33 tinglimir, og tí var eitt mandat leyst at berjast um. Um hugt verður burtur frá tí 33. mandatinum, var tað bert ein tinglimur, sum flutti seg úr einum flokki í annan.

Javnaðarflokkurin misti sjeynda mandatið og datt niður á seks tinglimir. Teir báðir smáu flokkarnir, Sjálvstýrisflokkurin og Miðflokkurin, fingu hinvegin ein tinglim afturat.

Á valinum í 2004 var broytingin í tingmannatalinum millum flokkarnar minimal, tí bert ein tinglimur flutti seg úr einum flokki í annan. Sambandsflokkurin misti ein tinglim og datt niður á sjey, meðan Miðflokkurin tvífaldaði sína tingmanning, sum nú taldi tveir tinglimir.

Á valinum í 2002 var talan um tveir tingsessir, sum skiftu eigara. Sambandsflokkurin hevði stóra framgongd og vann sær tvey nýggj mandat, meðan Fólkaflokkurin og Sjálvstýrisflokkurin mistu hvør sín sess.

Seinastu trý valini hava tí ikki verið merkt av teimum stóru broytingunum millum flokkarnar, sum vit vóru vitni til í teimum turbulentu nítiárunum við búskaparkreppu og bankagølu. Stabiliteturu og støðug búskaparlig framgongd hava óivað sína ávirkan á, at veljaraflytingarnar ikki hava verið serliga eyðsýndar á teimum báðum seinastu valunum.

Eitt val skal tó ikki bert tulkast út frá teimum broytingum, sum henda í býtinum av tinglimum millum flokkar. Hetta valið hevur t.d. verið serstakliga áhugavert í samband við útskiftingina av persónum innanfyri teir ymsu flokkunum framum býtið av tinglimum millum flokkarnar.

# Valdømini væl umboðað

**Tey gomlu valdømini vórðu ikki við sviðusoð, nú fyrsta løgtingsvalið undir nýggju valskipanini er hildið**

LØGTINGSVAL
*Stefan í Skorini*
*stefan@sosialurin.fo*

Tá skipanin við valdømunum kom í gildi fyri valið, óttaðust nógv, at fleiri valdømi fóru at vera við sviðusoð. Hesin dapri spádómur helt tó ikki í fyrsta umfari. Tey gomlu valdømini hava fingið nøkulunda tað umboðan, sum svarar til fólkatalið.

Suðurstreymoyar valdømi var í gomlu valskipanini undirumboðað í mun til fólkatalið. Økið hevði átta umdømisvaldar tinglimir umframt teir eykavaldu, sum fullu økinum í lut. Suðurstreymoy fekk trettan tinglimir, sum er ein markant øking. Hetta svarar til 39 prosent av tinglimunum, og 38 prosent av veljarunum búgva í Suðurstreymoy.

Eysturoyar valdømi fekk seks tingmenn, sum svarar til 18 prosent av tinglimunum, meðan 22 prosent av veljarunum búgva í økinum.

Norðoyggjar hava nú fimm tinglimir búgvandi í økinum, og tað er fimtan prosent av tí samlaða tinginum, og tólv prosent av veljarunum búgva í Norðoyggjum.

Norðstreymoyar valdømi, sum umboða átta prosent av veljarunum, fekk tveir tinglimir, sum tað eisini hevði áðrenn broytingina, og hetta er seks prosent av tinglimunum.

Vágarnar fingu tveir tinglimir, sum er seks prosent av tinglimunum, og 6,3 prosent av veljarunum búgva vesturi í Vágunum.

Sandoyar valdømi fekk bert ein tinglim, sum er trý prosent av tinglimunum, oyggin umboðar trý prosent av veljarunum.

Suðuroyggin eigur nú fýra tinglimir, sum er tað sama sum áðrenn. Í Suðuroy búgva 11 prosent av veljarunum, og oyggin hevur 12 prosent av tinglimunum.

Henda útrokning vísir, at valdømini hava fingið nøkulunda ta umboðan, sum tey hava rætt til sambært fólkatalinum.

Havast skal tó í huga, at tær broytingar, sum fleiri samfelagsfrøðingar og eygleiðarar ávaraðu um, kann gerast ein langtíðaravleiðing, sum ikki sæst á tí fyrsta løgtingsvalinum undir tí nýggju skipanini.